# Comeback til Paul Gascoigne



Kanska verður Poul Gascoigne at síggja í FA Cup kappingini komandi kappingarár? Í Onglandi finst ein felagsskapur, sum nevnir seg ”The Legends Series”. The Legends Series gera nógv burtur úr at savna kendar fótbóltsspælar til dystir, har peningurin fer til vælgerandi endamál. Nú ætlar The Legends Series at stilla við einum liði, sum bara skal verða mannað við gomlum FA Cup vinnarum. Nøvn, sum hava verið nevnd, umframt Poul Gascoigne, eru Ray Parlour, Lee Sharpe, Bryan Robson, Dave Beasent, Graeme Le Saux og Roberto di Matteo. Hesir hava allir vunnið FA Cup kappingina, og eru teir allir omanfyri 35 ár. Fyrrverandi Leeds-hetjan, Paul Reaney vísur aftur, at ætlanin við einum slíkum dreymaliðið er tann reini heilaspuni. - Vit meina hetta seriøst. Vit stilla ikki upp, fyri at verða gjørdir til tað turra spott, sigur hann.

# Hvat megnar VB

**Stóri dysturin um vikuskiftið verður í Klaksvík, har tey bæði fremstu liðini í føroyskum kvinnuhondbólti hittast**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Stjørnan og VB eru higar til fremstu kvinnuliðini í landinum. Um vikuskiftið skal finnast útav, hvat teirra er tað sterkara júst nú*

Meðan bæði Neistin og Tjaldur hava uppgávur, sum á pappírinum eru yvirkomuligar, tá tey spæla móti ávíkavist Kyndli og StÍF, so tykist spenningurin vera nakað væl størri í Klaksvík.

Gamaní vann Stjørnan trygt, tá tær vitjaðu í Vági í fyrsta dystinum millum liðini. Men í nógvar aðrar mátar hevur VB víst seg sum ein sera seriøsan avbjóðara til FM-trúnuna hjá Stjørnuni. Bæði tí liðið í ár tykist hava eina betri samanseting og eina størri breidd, enn tær hava havt seinnu árini. Og eisini tí tær við sigrum á Neistanum og Tjaldri hava víst, at tær avgjørt ikki vilja lata sær lynda leiklutin sum triðja ella kanska fjórða violin hetta kappingarárið.

Stjørnan hevur hinvegin heldur ikki sýnt nøkur tekin um, at tær ætla sær av hondbóltstrúnuni, sum tær nú verja triðja árið á rað. Fram um øll onnur í landinum, so hava klaksvíkarkvinnurnar sett standardin í føroyskum kvinnuhondbólti hesi árini, og so er spurningurin, um tær enn einaferð seta ein avbjóðara til viks, ella um VB megnar at økja um spenningin fyri kappingina, tó at hendan enn er ung.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 16.11 | 14.30 | Kyndil-Neistin |
| 16.11 | 15.00 | Stjørnan-VB |
| 16.11 | 15.00 | Tjaldur-StÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 16.11 | 16.00 | VÍF-StÍF |
| 16.11 | 16.00 | KÍF-H71 |
| 16.11 | 16.00 | Kyndil-Neistin |

**Flogbóltur**
Eik-ligan, kvinnur

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 5 | 5 | - | 0 | - | 0 | 139 | 93 | 46 | 10 |
| 2 VB | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 136 | 114 | 22 | 8 |
| 3 Neistin | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 126 | 113 | 13 | 5 |
| 4 Tjaldur | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 113 | 109 | 4 | 5 |
| 5 StÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 107 | 142 | -35 | 2 |
| 6 Kyndil | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 87 | 137 | -50 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 129 | 119 | 10 | 8 |
| 2 StÍF | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 119 | 109 | 10 | 7 |
| 3 H71 | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 136 | 120 | 16 | 6 |
| 4 Neistin | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 153 | 145 | 8 | 6 |
| 5 KÍF | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 116 | 135 | -19 | 2 |
| 6 Kyndil | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 113 | 138 | -25 | 1 |




# VÍF vil aftur á beint

**Úrslitini seinasta vikuskiftið krympaðu veruliga oddin saman. Nú hevur VÍF møguleikan at krøkja ein av kappingarneytunum av**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sigurin hjá H71 móti VÍF seinasta sunnudag var á leið júst tað, sum skuldi til, fyri at skapa mest møguligan spenning í bestu mansdeildini í hondbólti.

Tað bar við sær, at hoyvíkingarnir nú aftur eru partur av veruliga oddinum, og tað gjørdi eisini, at VÍF ikki skal kenna seg trygt um nakað sum helst.

Og tí er trýstið eisini á vestmenningunum, tá teir sunnudagin taka ímóti StÍF. StÍF hevur higar til fylgt væl við í oddinum, og hóast tríggir fjórðingar eru eftir á mál, so vilja teir avgjørt tosa við um eitt finalupláss saman við VÍF, Neistanum og H71.

Tey bæði seinastu nevndu mugu finna seg í at átaka sær favoritt-leiklutin um vikuskiftið. Gaman í vann KÍF sín fyrsta sigur um vikuskiftið, men avrikini hjá H71 higar til hava bent á, at teir væl og virðiliga eiga at vera klassan betri enn kollfirðingarnir. Og tað sama kann sigast um leiklutin hjá Neistanum móti Kyndli, sum enn eigur síni fyrstu stig tilgóðar.



*Fyrr í ár vann VÍF útidystin móti StÍF. Hesa ferð hava teir møguleikan at seta strandingar eftir í oddastríðnum*